UTTAN ÚR HEIMI

## Ógvusligt lufthol

40 ferðafólk og ellivu av manningini fingu skaða, tá eitt flogfar hjá suðurkoreanska flogfelagnum Korean Air kom í eitt stórt lufthol hósdagin.

Flogfarið var farið úr Bali í Indonesia og hevði flogið einar 40 minuttir, tá tað brádliga kom í tað stóra luftholið. Ein talsmaður hjá flogfelagnum sigur við Reuters, at luftholið sást ikki á radaranum, og tí óraði eingin ilt, fyrr enn flogfarið brádliga datt langt niður ígjøgnum tað lufttóma holið. Tað var so ógvusligt, at 40 av teimum 257 ferðafólkunum og 11 av manningini fingu skaða.

Flogfarið helt leiðina fram til Seoul í Suðurkorea, og tey, sum høvdu fingið skaða, vórðu alt fyri eitt flutt á sjúkrahús. Øll uttan ein 35 ára gamal maður sluppu tó heim aftur beinanvegin. Hann hevði fingið so mikið álvarligan løst í høvdið, at hann bleiv innlagdur.

## Heimahjálparar gevast

Teir yngru heimahjálpararnir í Danmark eru so misnøgdir við arbeiðsviðurskiftini, at 60 prosent av teimum, sum eru yngri enn 40 ár, umhugsa at finna sær okkurt annað at gera.

Tað sæst í einari kanning, sum felagið Fag og Arbejde hevur gjørt. Teir ungu heimahjálpararnir siga, at teir hava alt ov stutta tíð til at fullføra sínar uppgávur, og at tað er tyngjandi. Fleiri teirra halda seg ikki hava tíð til at geva teimum eldru ta hjálp, tey hava fyri neyðini, og teir kæra seg eisini um, at teir hava heldur ikki stundir til at tosa við tey eldru.

Danska eldrafelagið, Ældre Sagen, sigur, at kanningarúrslitið er einki minni enn ein bumba, og formaðurin í almannanevndini hjá Fólkatinginum, Pia Kristensen, sigur við Politiken, at politikararnir mugu forða fyri, at heimahjálpararnir siga upp. Tí er umráðandi at geva teimum betri arbeiðsviðurskifti, sigur hon.

## Væl umtókt bók

Í Danmark verður tað vanliga ikki hildið at vera serliga lønandi at arbeiða sum rithøvundur, men Morten Ramsland er eitt undantak í so máta.

Fyri seks vikum síðani gav hann út skaldsøguna "Hundehoved", og hon hevur fingið sjáldsama góða móttøku. Donsku ummælararnir hava róst bókini til skýggja, og útlendsk forløg hava eisini fingið áhuga fyri henni. Longu nú er avtalað, at bókin skal koma út á norskum, svenskum, niðurlendskum, týskum og enskum, og tað hevur givið rithøvundinum hálva aðru millión krónur. Tá er sølan í Danmark ikki íroknað, og í teimum donsku bókahandlunum kann eingin bók kappast við "Hundehoved". .

Morten Ramsland hevur starvast sum hjálpari hjá menningartarnaðum í Brabrand við Århus, men fyri nøkrum døgum síðani segði hann arbeiðið frá sær. Nú ætlar hann sær at brúka tíðina til at skriva, sigur hann við DR.

## Heimsins besta hotell

Dámar tær væl at ferðast og at búgva á hotelli, átti tú kanska at roynt hotellið Four Season í Bali í Indonesia, tí sambært tíðarritinum Travel ans Leicure er tað besta hotellið í heiminum.

Ert tú nøgd ella nøgdur við tað næstbesta, skalt tú til Suðurafrika, tí heimsins næstbesta hotell er Singita Private Games Reserve í Sabi Sand. Hetta hotellið bleiuv kosið heimsins besta í fjør, men endaði á øðrum plássi í ár.

Bara tvey evropeisk hotell eru á listanum við tíggju teimum bestu hotellunum í heiminum. Chateau Les Crayeres í franska býnum Reims er á sætta plássi, og Four Season í Istanbul er nummar tíggju. Hini hotellini á listanum eru í India, Teilandi, Avstralia og í USA.

# Myndatól kunnu avdúka yvirgangsmenn

**Tað vóru tey nógvu myndatólini í London, sum hjálptu løgregluni at avúka, hvørjir bumbumenninir vóru. Nú vil danska løgreglan eisini hava slík tól**



Hasib Hussain var ein av bumbumonnunum í London. Tann minna myndin, sum er úr einum myndatóli, vísir, at hann hevði bumbuna á rygginum

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

London er kendur fyri tey nógvu myndatólini, sum halda eyga við teimum, sum ferðast í gøtunum, og uttan hesi tólini hevði bretska løgreglan ikki kunnað avdúka menninar, sum sprongdu bumburnar í London.

Fyri nøkrum døgum síðani hóttu yvirgangsmenn við at søkja at málum í Danmark, men hóast økta tilbúgving hevði danska løgreglan ikki havt somu møguleikar at avdúka møguligar bumbumenn. Tí tann danska lóggávan loyvir ikki slíkum eftirliti á almennum støðum, og sum er er heldur ikki politiskur meiriluti fyri at seta fleiri myndatól upp.

Tað harmar løgregluna í Keypmannahavn. Mogens Kjærgaard Møller, sum er varaovasti hjá løgregluni í býnum, segði við danska útvarpið í gjár, at tað hevði komið løgregluni væl við, um fleiri myndatól vórðu sett upp á almennum støðum.

Tað er sagt, at tann, sum ferðast í gøtunum í London, verður avmyndaður minst 300 ferðir um dagin, tí har eru myndatól at kalla allastaðni. Í Danmark eru myndatólini bara loyvd á jarnbreytarstøðunum, í tokum, á flogvallum, í bankum og sjálvtøkum og á posthúsum. Men Mogens Kjærgaard Møller heldur, at tað er nógv, sum talar fyri, at fleiri myndatól eiga at verða sett upp.

- Eitt myndatól heldur eyga við øllum, sum hendir, og tí er tað eitt sera gott vitni, sigur hann.

Hóast politikararnir hava lítlan hug at økja eftirlitið í teimum donsku gøtunum, halda flestu danir, at tað hevði verið tað rætta. Sambært einari kanning siga tveir triðingar av teimum spurdu, at tey hava einki ímóti at verða avmyndað, meðan tey ganga í gøtunum.

# Flóttafólk send heim til píning og deyða

**Fyri tveimum mánaðum síðani flýddu 426 fólk úr Usbekistan til grannalandið Kirgisistan eftir hópdrápið í býnum Andijan. Nú krevja usbekisku myndugleikanir, at tey verða send heimaftur**

FLÓTTAFÓLK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Usbekisku myndugleikarnir siga, at tey 426 flóttafólkini eru yvirgangsfólk, og at myndugleikarnir í grannalandinum Kirgisistan tí eiga at senda tey heimaftur, so tey kunnu revsast.

Fyri at leggja dent á kravið hevur usbekiska stjórnin sent herfólk til markið. Eygleiðarar siga, at ætlanin við tí er annaðhvørt at leggja trýst á kirgisisku stjórnina ella ein beinleiðis fyrireiking til álop á grannalandið. Tí er støðan sera álvarssom, sigur ST.

- Eg eri bangin fyri, at Vesturheimurin skilir ikki, hvussu álvarssom støðan í Miðasia er, og tí heita vit á Vesturheimin um at bjarga hesum fólkunum, sigur Carlos Zaccognini, sum er ST-flóttafólkaumboðsmaður í Miðasia, við Politiken. Higartil hevur Danmark játtað at taka ímóti tjúgu av teimum 426 flóttafólkunum, Svøríki hevur játtað at taka ímóti átta og Niðurlond fýra.

Carlos Zaccagnini sigur, at teir usbekisku myndugleikarnir fara helst at slaka fyri kravinum úr Usbekistan, sjálvt um teir vita, at fólkini fólkini verða pínd og kanska eisini tikin av døgum, verða tey send heimaftur. Hósdagin játtaði kirgisiska stjórnin at senda 25 usbekar heimaftur, og at hon fer at taka støðu til lagnuna hjá 82 øðrum um vikuskiftið.

Carlos Zaccognini væntar, at kirgisiska stjórnin fer at slaka uppaftur meiri, og at uppaftur fleiri verða send aftur til Usbekistan.

- Tað verður ein vanlukka. Tað má ikki henda, sigur hann við Politiken.